## Oyggjablaðið

**Oyggjaredaktiónin:**



Snorri Brend
snorri@sosialurin.fo



Jens Kristian Vang
jensk@sosialurin.fo

## Næstu ferð:
# Sandoy



*Í Mikladali búgva 35 fólk, og í allari oynni 109*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# 35+19

**FÓLKATAL** Tað vóru tíðina, tá nógv fólk búðu í báðum teimum norðastu bygdunum á Kalsoynni. Í dag gongur tað afturá, men fólkið trívist kortini

Snorri Brend

Sambært yvirlitinum frá Hagstovuni búðu 55 fólk í Mikladali og 24 í Mikladali í 2005. Men síðani eru nógv flutt haðani.

Nýggjastu hagtølini vísa, at í farnu viku var fólkatalið í Mikladali komið niður á 35 – ein afturgongd uppá 20 fólk eftir fimm árum.

Sama gongdin hevur eisini verið í grannabygdini fyri norðan. Har búðu 24 fólk í 2005 og 19 í farnu viku. Ein afturgongd uppá fimm fólk eftir fimm árum.

Báðar bygdirnar hoyra til Klaksvíkar kommunu, og verður fólkatalið í teimum lagt saman við Húsa kommunu á somu oyggj, búgva sostatt 109 fólk á Kalsoynni.



**NÝGGJAN LYKTAPELA**

*Trøllanes: Eitt óhapp, har ein bilur rendi á ein av lyktapelunum í bygdini, førdi tað við sær, at neyðugt var fáa annan pela settan upp. Hetta hendi í farnu viku, tá tveir mans frá elfyritøkuni Tummasi Thomsen í Klaksvík vóru á Trøllanesi fyri at fremja hetta í verki.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*